## Bankar gera mun á fólki

Hevur tú bústað í Grønlandi og ætlar tær at læna pengar í bankanum, so er tað ein fyrimunur, at tú býrt í einum av teimum fýra størstu býunum. Tað sigur Krista P. Isaksen. Sjálv er hon borgarstjóri í Narsaq kommunu, men hon sigur, at hernnara borgarar kunnu ikki taka realkreditlán á sama hátt sum borgararnir í Qaqortoq, Nuuk, Sisimiut og Ilulissat. Í hinum kommununum kunnu fólk bara fáa bankalán, sum eru væl dýrari, sigur Krista P. Isaksen.



## Minni upp á land

Tað kom munandi minni fiskur upp á land í Íslandi í síðsta mánað enn í september í fjør. Í ár var nøgdin 44.865 tons, og tað var lítið meiri enn helmingurin av tí, sum kom upp á land í september í fjør. Tá var nøgdin 87.200 tons. Av botnfiski komu góð 28.000 tons upp á land í síðsta mánað ímóti næstan 38.000 tonsum í sama mánað í fjør. Toskaveiðan, sum er skerd nú, minkaði heili 40 prosent - úr 14.270 tonsum í 8.600 tons.

# størsta frystihús í Kina




*Nógv varð gjørt burtur úr, tá stóra frystigoymslan hjá Eimskipum í kinverska býnum Qingdao alment varð latin upp herfyri*

*Mynd: Steinbjørn í Dali*




*Íslendski forsetin, Ólavur Ragnar Grimsson, klipti snórin – og her heldur hann talu fyri mannamúgvuni*

*Mynd: Steinbjørn í Dali*

Steinbjørn heldur, at kinverjar helst vilja "avprøva" eina slíka avtalu við eitt minni land sum Ísland, áðrenn teir gera fleiri avtalur við londini í Evropu.

- Soleiðis kann avtalan millum Kina og Ísland gerast ein fyrimynd fyri onnur lond um hesar leiðir, leggur hann aftrat.

### Duga væl

Íslendingar hava seinnu árini tikið nógv stór stig, sum hava vakt ans og hava elvt til umrøðu, bæði góða og minni góða. Tað eru tey, sum halda, at íslendingar eru óførir, bæði heima og úti í heimi, og so eru tað tey, sum halda, at teir "satsa" ov nógv, og at vandi er fyri búskapinum, um stóru íløgurnar vísa seg ikki at vera lønandi.

- Eg haldi, at tað sær rættiliga spennandi út hjá íslendingum, og eg haldi eisini, at tað sær skilagott út, sum teir gera. Átakið í Kina vísir, at íslendingar duga ótrúliga væl at marknaðarføra seg, og tað verður spennandi at síggja, hvat kann spyrjast burtur úr hesum.

Hann vísir á, at íslendingar eru ikki bangnir fyri at stíga fram, og teir eru ikki bangnir fyri at siga og gera tað, teir hugsa og halda er rætt.

Hinvegin tykir mær, at føroyingar eru meira beskeðnir, sigur hann.

### Vind í "seglini"

Ráðgevin hjá Samvit ivast onga løtu í, at íløgan hjá Eimskipum í Qingdao kemur at geva íslendingum vind í "seglini" í Kina.

Við á ferðini í Kina var eisini eitt umboð fyri fyritøkuna SNG í Føroyum, sum hevur framleiðslu øðrum býi í Kina. Umboðið var Jógvan Nielsen.

- SNG er eisini viðskiftafelag hjá Eimskipum í sambandi við flutning, og tí vóru teir bodnir við, sigur Steinbjørn í Dali, ráðgevi.



*Kinverjar gjørdu nógv burtur úr og settu sín serstaka dám á hátíðarhaldið*

*Mynd: Steinbjørn í Dali*